# Snýttu seg til dýran Porsche

Ein ung kvinna og maður eru ákærd fyri groft svik. Við følskum pappírum útvegaðu tey sær ein luksusbil til 800.000 krónur. Talan var um ein Porsche Cayenne, og haraftrat svikaðu tey sær til eina gravkúgv. Tey vórðu framsett í grundlógaravhoyring hósdagin ákærd fyri grovt svik og dokumentfalsan, sigur løgreglan í Keypmannahavn við BT.dk



# Prógv fyri vatni á mánanum

Tríggir ymiskir bólkar av granskarum hava sambært norska blaðnum VG funnið greið prógv fyri, at vatn finst á mánanum. Allir tríggir granskarabólkarnir eru komnir tikl somu niðurstøðu, vísir ein frágreiðing, sum viðurkenda tíðarritið Science kunngerð fríggjadagin. – Tá vit tosa um »vatn á mánanum«, snýr tað seg ikki um vøtn, men um vatnmolokylir blandað við støv á yvirflatuni á mánanum, sigur Carle Pieters frá ivy league-universitetinum Brown á Rhode Island.



*Eitt dómarapanel hevur júst givið reintøknini hjá MicroDrop Aqua tríggjar stjørnur – av trimum møguligum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Vatn verður jú brúkt sum matvøra og í matvøruframleiðsluni, bæði í vinnuni og í húsarhaldinum.

Hann vísir á, at um vatnið ikki er sóttreinsað nóg væl, kann spilla taka seg upp.

- Ikki minst, nú slaktið kemur fyri, eiga vit at geva vatngóðskuni ans – eisini við atliti til botulismu, sum trívist væl í vatni, sigur Jákup á Lag, umboð hjá MicroDrop Aqua í Føroyum.



*Bakur og Stelkur fiska fram úr væl og ikki minst, tá veiðan hjá partrolarum sum heild er lakari enn vanligt, gera hesir báðir ísfiskatrolararnir oftast túr kortini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fáa minni av upsa

**Fyri trimum mánaðum síðan fingu teir bestu partrolararnir eini 400.000 pund av upsa eftir einari viku. Nú liggur veiðan um sløk 300.000 pund fyri sama tal av døgum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaðu partrolararnir Rókur og Lerkur 290.000 pund á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará.

Týsdagin var eitt annað par, Jaspis og Ametyst, inni, og teir høvdu 140.000 pund av upsa.

Fara vit aftur til endan av seinastu viku, løgdu partrolararnir Bakur og Stelkur veiðina upp fríggjadagin. Teir høvdu 290.000 pund av upsa.

Á landingarmiðstøðini hjá Beta siga tey, at upsaveiðan hjá partrolarum hevur verið heldur lakari seinastu tíðina, enn hon annars hevur verið tað mesta av hesum árinum.

- Hetta plagdi at vera góð tíð til upsa, men eisini í fjør sóu vit nøkulunda sama mystur, har veiðan var heldur slakari um júst hesa tíðina. Síðan tók góða upsaveiðan seg uppaftur, tá tað leið nakað longur út á heystið.

Fyri umleið trimum mánaðum síðan fingu teir bestu partrolararnir eini 400.000 pund av upsa eftir einari viku.

- Nú liggur veiðan hjá somu skipum um sløk 300.000 pund fyri sama tal av døgum. So, upsaveiðan er sum heldur nakað lakari í løtuni, enn hon hevur verið tað mesta av hesum árinum, siga tey á landingarmiðstøðini hjá Beta.

# Gjørdu tveir túrar aftrat

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Hóast gulllaksavirkið Tavan í Leirvík herfyri læt almenningin vita, at virkið nú varð hildið uppat við at keypa og virka gulllaks í hesi vertíðini, hevur virkið kortini keypt fýra lastir aftrat.

Polarhav og Stjørnan, sum landa í Saltangará í dag, hava 360.000 pund av gulllaksi, sum Tavan keypir.

Hetta er soleiðis annar túrurin hjá hesum skipum, síðan Tavan annars ætlaði at gevast.

Hin fyrra túrin av tveimum høvdu skipini 420.000 pund av gulllaksi og 40.000 pund av upsa.

Nú verður lagt um, og áðrenn Polarharv og Stjørnan aftur fara á upsaveiði, skal okkurt smávegis gerast, sum fer at taka eina lítla viku ella so.